# Hugnalig og fjølbroytt konsert í Runavík

**Býráðssalurin hjá Runavíkar Kommunu var mánakvøldið stúgvandi fullur av fólki, sum vóru komin á eina fjølbroytta konsert við fleiri ungum tónleikarum**

KONSERT
*Lív Reinert Kjeld*
*liv.reinert.kjeld@skulin.fo*

Í gjárkvøldið var konsert í býráðssalinum hjá Runavíkar Kommunu. Konsertin var í samband við mentanarvikuna, sum er í Runavík í hesum døgum. Nógv fólk var komið til konsertina, sum byrjaði klokkan hálvgum átta.

Ein bólkur av ungum næmingum undir leiðslu av hornorkesturleiðaranum Kenneth Jones legði fyri. Bólkurin var mannaður við Katrini Árnadóttir, Hallgerð Árnadóttir, Janu Abrahamsen og Duritu Johannesen úr Oyndarfirði, Áka Leitisstein Hansen úr Runavík, Jóngerð Juul Olsen úr Rituvík og Dávur Juul Magnussen úr Havn. Tey spældu lættan, góðan horntónleik; m. a. var kenda lagið Blue Moon at hoyra.

Næst á skránni var ein trio, sum var mannað við 14 ára gomlu Sonju á Reynatrøð, sum spældi klaver, 12 ára gomlu Bjørt Simonsen á sello og 16 ára gomlu Joan Simonsen á violin. Tær spældu eitt klassiskt verk hjá Eliasi Davidsen. Allar tríggjar venja hjá Tóra Restorff Jacobsen, sum er lærari á musikkskúlanum í Havn, Runavík, Klaksvík og Fuglafirði.

Síðan spældi 15 ára gamla Jórun Hansen av Skipanesi trý klassisk verk á klaver. Jórun hevur spælt klaver í níggju ár í musikkskúlanum hjá Jóannesi Andreassen, og hevur tvær ferðir verið við á tí navnframa »Steinway Festivalinum«.



*Katrin Hovland Petersen hugtók við frálíkum klarinettspæli*

*Mynd: Lív Reinert Kjeld*

16 ára gamla Katrin Hovland Petersen úr Saltangará hevur sum einasti føroyingur spælt á hørpu í nøkur ár, men mánakvøldið hevði hon tikið klarinettina fram. Saman við musikkskúlalærarunum Bjarna Berg á klarinett og Birgitte Snackenburg á klaver spældi hon trý klassisk verk. Katrin gongur á »Orkesterefterskolen« í Holstebro í Danmark. Hon hevur vunnið fyrstu virðisløn í eini kapping, sum eitur »Den Berlingske Tidendes Klassiske Musikkonkurrence«.

Høvuðsnavnið á konsertini var Ida Kellemann Thomsen úr Hirtshals. Ida er 16 ára gomul, og gongur í »Talentklasse« í musikkskúlanum í Hirtshals, har hon umframt klaverundirvísing hevur hoyrilæru og tónleikateori. Ida hevur spælt klaver í níggju ár, og hevur m. a. fleiri ferðir verið við í »Den Danske Steinway Festival«.

Sum heild kann sigast, at konsertin eydnaðist væl. Skráin var fjølbroytt, og Jóannes S. Hansen, sum var frásøgumaður, kom sera væl frá uppgávuni. Hann visti nógv at siga um tey ymisku tónaskøldini, og setti sín heilt serliga dám á konsertina.

# Seyðasýning 2005 í Vági

**Fríggjakvøldið 28. oktober verður árliga seyðasýningin í Vági og tað er Stóra Pakkhús og økið kring húsið, ið er karmur um tiltakið. Møguleiki verður at skanna seyðin**

SEYÐASÝNING
*dagfinn@sosialurin.fo*

Seyðasýningin 2005 í Vági verður fríggjakvøldið í Stóra Pakkhúsi. Byrjað verður stundisliga klokkan 18 og luttakaragjaldið er 100 krónur, umframt at luttakarar eisini hava eitt fat við smurdum breyði við.

**Seyðaskanning**

Nýggj tøkni er komin til landið, so til ber at skanna seyð fyri feitt.

Eyðstein Jensen verður á staðnum og møguleiki verður at fáa seyðin skannaðan móti enum gjaldi á 15 krónur.

Seyðasýningin í Vági er afturvendandi tiltak og áhugin fyri tiltakinum er stórur fyri sýningini, siga fyrireikararnir.


